# Samd um at fáa tað besta burtur úr

**– Eg atkvøddi ikki fyri samanlegging, men nú fólkið hevur talað, hava vit í bygdaráðnum staðfest fólkaatkvøðuna og eru samd um at fremja samanleggingina við Runavíkar kommunu, sigur Andrias Hammer, bygdaráðsformaður í Elduvíkar kommunu**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Leygardagin var fólkaatkvøða í Elduvíkar kommunu um samanlegging við Runavíkar kommunu.

Í Elduvíkar kommunu eru bygdirnar, Elduvík og Funningsfjørður. Í kommununi búgva tilsamans 88 fólk, harav stívliga tveir triðingar búgva í Funningsfirði.

Atkvøtt varð bæði í Elduvík og Funnigsfirði. Í Elduvík stóð á jøvnum; 10 fyri samanlegging og 10 ímóti. Tveir veljarar vóru ikki á vali, og eingin atkvøða var blonk. Í Funningsfirði vóru 29 veljarar fyri og 17 ímóti. Tveir veljarar vóru ikki á vali, og ein atkvøða var blonk.


*– Nú fólkið hevur talað, er tað okkara uppgáva at fremja henda viljan í verki, og tað fara vit at gera so væl, sum vit duga, sigur Andrias Hammer, bygdaráðsformaður í Elduvíkar kommunu*

### Staðfesting

Mánakvøldið var bygdaráðsfundur í Elduvíkar kommunu, har eitt samt bygdaráð staðfesti úrslitið av fólkaatkvøðuni.

Undan fólkaatkvøðuni var greitt, at teir fimm bygdaráðslimirnir vóru ikki samdir um samanlegg-ingina. Tríggir vóru fyri og tveir ímóti. Millum tey, sum vóru ímóti, var bygdaráðsformaðurin, Andrias Hammer, sum býr í Funningsfirði.

– Nú fólkið hevur talað, og meiriluti er fyri samanlegging, er tað eitt samt bygdaráð, sum hevur staðfest fólkaatkvøðuna. Nú fara vit í felag at arbeiða fyri at fáa øll viðurskifti í samband við samanleggingina uppá pláss, sigur hann.

Andrias ásannar, at hóast hann ikki var so heitur fyri samanleggingini, gekk hann kortini ikki og agiteraði ímóti.

– Eg helt, at fólkið skuldi sleppa at tala, og nú fyriliggur so úrslitið.

Hann vísir á, at 1. januar ár 2005 verður Elduvíkar kommuna tískil løgd saman við Runavíkar kommunu.

– Hetta verður eftir sama leisti, sum avtalaður er millum Skála kommunu og Oyndarfjarðar kommunu øðrumegin og Runavíkar kommunu hinumegin.

### Eingin ósigur

Andrias sigur, at úrslitið av fólkaatkvøðuni kennist ikki sum ein ósigur, hóast hann ikki var heitastur fyri samanleggingini beint nú.

– Tá ið fólkið hevur talað, er tað okkara uppgáva at fremja henda viljan í verki, og tað fara vit at gera so væl, sum vit duga.

Bygdaráðsformaðurin sigur seg vóna, at samanleggingin verður til fyrimunar fyri borgararnar í Elduvíkar kommunu.

– Vit eru ein lítil kommuna, og kunnu vit vinna nakrar fyrimunir við at verða partur av eini størri eind, eri eg sjálvsagt fegin um tað, sigur Andrias Hammer at enda.

# Fegnist um at bygdaráðið stendur saman

**– Tað hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum, at bygdaráðið í Elduvíkar kommunu stendur saman og einmælt hevur staðfest fólkaatkvøðuna, nú fólkið hevur talað, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, var millum teirra, sum var hjástaddur, tá ið upptalt varð í Elduvíkar kommunu eftir fólkaatkvøðuna um samanlegging leygarkvøldið.

– Fitt av fólk var samankomið í skúlanum í Funningsfirði, og eg haldi, at stemningurin var rímiliga góður. Tá ið úrslitið fyrilá, hevði eg ta kenslu, at fólk høvdu virðing fyri tí úrsliti, ið spurdist burtur úr.

Rodmundur er ógvuliga fegin um, at bygdaráðið í Elduvíkar kommunu nú einmælt hevur staðfest úrslitið av fólkaatkvøðuni og er samt um at fremja fólksins vilja í verki. Hann er eisini fegin um, at samlaða úrslitið hóast alt gjørdist so greitt, sum talan var um.


*– Nú tíðin, ið eftir er av hesum valskeiðnum, er so stutt, er ikki hugsandi, at fleiri samanlegging verða í hesum valskeiðnum, sigur Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu*

– Semjan, sum nú er í bygdaráðnum, hevur ómetaliga stóran týdning fyri okkum, leggur hann dent á.

Býráðsformaðurin sigur seg vera spentan upp tað arbeiði, sum nú byrjar millum Elduvíkar kommunu og Runavíkar kommunu.

– Tað eru nógv ting at taka fatt um við eini slíkari samanlegging, og hetta arbeiði fer í gongd beinanvegin.

Rodmundur vísir á, at fundamentið undir sáttmálanum millum Elduvíkar kommunu og Runavíkar kommunu er tað sama, sum lagt er fyri hinar báðar samanleggingarnar, nevniliga Skála kommunu og Runavíkar kommunu og Oyndarfjarðar kommunu og Runavíkar kommunu.

### 3609 fólk

Býráðsformaðurin sigur, at í løtuni búgva tilsamans 3.609 fólk í Runavíkar kommunu og teimum kommunum, sum hava avgjørt at leggja saman við Runavíkar kommunu.

Hann vísir á, at tá ið hetta valskeiðið byrjaði, búðu 2.475 fólk í sjálvari Runavíkar kommunu, men 1. mars í ár var talið komið uppá 2.657.

– So, her er ein ávísur fólkavøkstur alla tíðina, sigur hann.

Rodmundur vísir á, at høvuðssætið hjá Runavíkar kommunu og kommununum, sum nú verða lagdar saman við kommununi, verður í Saltangará.

Spurdur, um væntandi er, at umsitingin fer at veksa, sigur hann, at sjálvsagt verður meira at takast við, nú kommunan veksur, men miðjað verður eftir ikki at økja umsitingarligu útreiðslurnar.

– Hinvegin er ikki óhugsandi, at hesar kunnu gerast nakað hægri so hvørt, sum arbeiðsbyrðan veksur, men vit fara at leggja dent á, at umsitingarútreiðslurnar verða so lágar sum gjørligt, sigur býráðsformaðurin.

Rodmundur Nielsen sigur, at nú tíðin, ið eftir er av hesum valskeiðnum, er so stutt, er ikki hugsandi, at fleiri samanlegging verða í hesum valskeiðnum.

Hann vísir á, at bert í hesum valskeiðnum hava tríggjar kommunur gjørt av at leggja saman við Runavíkar kommunu.

– Um talan verður at fleiri samanleggingar, dugi eg ikki at meta um beint nú, sigur Rodmundur Nielsen.



# Tjaldrið tók við Kirkjutanga


*Bjargingarskipið, Tjaldrið, er í løtuni á beding á Tórshavnar Skipasmiðju*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bjargingarskipið, Tjaldrið, er í løtuni á beding á Tórshavnar Skipasmiðju. Orsøkin er ein róðurskaði, ið Tjaldrið fekk Langa fríggjadag, tá bjargingarskipið tók við Kirkjutanga í Nólsoy**

UMVÆLING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinastu vikuna hevur bjargingarskipið, Tjaldrið, verið á beding á Tórshavnar Skipasmiðju. Langa fríggjadagin var Tjaldrið á Nólsoyarfirði, og bjargingarskipið var so óheppið taka við Kirkjutanga í Nólsoy.

Tjaldrið fekk ein róðurskaða og í løtuni verður róðrið umvælt á Tórshavnar Skipasmiðju. Sum skilst verður róðursstamman skift og sambært stjóranum á Vaktar- og Bjargingartænastuni, Elmar Højgaard, fer Tjaldrið væntandi aftur í sigling seinni í vikuni.

Umframt umvæling av róðursskaðanum hevur Tjaldrið eisini verið til sýn á Tórshavnar Skipasmiðju.

# Sølan av persón- og vørubilum minkar


*Í hesum døgum er altjóða bilaframsýningin, Copenhagen Motor Show 2004, í Bella Center á Amager, har fleiri hundrað nýggir bilar verða sýndir fram*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hagtøl frá Bileftirlitinum, fyri fyrsta ársfjórðing 2004, vísa, at sølan av nýggjum akførum framvegis er minkandi. Sølan av persónbilum er minkað við eini 23 prosentum í mun til í fjør**

AKFØR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Bileftirlitið hevur sent út tíðindaskriv við hagtølum yvir skráseting av nýggjum akførum fyrsta ársfjórðing 2004.

Tølini vísa, at sølan av persónbilum og vøruvognum minkar mest. Í ár eru seldir 305 persónbilar í mun til 234 sama tíðarskeið í fjør, og av vørubilum eru seldir 49 í mun til 74 í fjør.

Annars er ikki tær stóru broytingarnar í søluni av nýggjum akførum.

**Hagtøl fyri skráseting av nýggjum akførum fyri fyrsta ársfjórðing í 2004 og 2003**

| Akfaraslag | Mars 2004 | Mars 2003 | Broyting Mar 03/04 | Jan-Mar 2004 | Jan-Mar 2003 | broyting 2003/2004 | %broyting 2003/2004 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bussar | 0 | 2 | -2 | 0 | 2 | -2 | -100,00% |
| Hýrubilar | 7 | 1 | 6 | 8 | 5 | 3 | 60,00% |
| Lastbilar | 0 | 0 | 0 | 6 | 1 | 5 | 500,00% |
| Leguvognar | 0 | 1 | -1 | 0 | 3 | -3 | -100,00% |
| Motorsúkkla | 1 | 4 | -3 | 2 | 4 | -2 | -50,00% |
| Neyðsendakfar | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | -1 | -100,00% |
| Persónbilar | 102 | 115 | -13 | 234 | 305 | -71 | -23,28% |
| Smábussar | 1 | 0 | 1 | 2 | 1 | 1 | 100,00% |
| Tangabilar | 0 | 3 | -3 | 0 | 3 | -3 | -100,00% |
| Viðfestivognar | 7 | 4 | 3 | 20 | 16 | 4 | 25,00% |
| Vøruvognar | 22 | 25 | -3 | 49 | 74 | -25 | -33,78% |
| **Samlað** | **140** | **155** | **-15** | **321** | **415** | **-94** | **-22,65%** |

Tað eru skrásett 36 nýggj prutl í fyrsta ársfjórðingi 2004

# 35 mio. í Tema Kapital

Herfyri skipaðu Føroya Sparikassi, Kauphing og Tema-Kapital fyri temadegi um at gera íløgur í partabrøv.

Føroya Sparikassi og Kauphing samstarva um íløgufelagið Tema Kapital og fyrsta tekningarumfar hjá StockRate-deildini hjá Tema Kapital var á temadegnum. Føroyskir og danskir Íleggjarar keyptu íløgubrøv fyri tilsamans 35 mio. krónur í.

Á heimasíðuni hjá Føroya Sparikassa verður sagt, at góðar fýra mió. kr. vórðu seldar umvegis Føroya Sparikassa, sum eisini keypti ein part sjálvur bæði sum eina íløgu og at selja kundum, ið ikki keyptu, áðrenn tekningarfreistin var úti.

Fíggjarleiðarin á Føroya Sparikassa, Finn Danberg, sigur í stuttari viðmerking, at úrslitið av fyrsta tekningarumfari má metast at vera hampuliga gott, tá stutta tekningafreistin verður havd í huga.

**-páll**

# Mótasýning á Platform

Komandi fríggjakvøld verður mótasýning á Platform. Handlarnir, ið fara at sýna fram eru Siri, Diva, Juniik, Bonnie og Clyde, Deres og Trend Floor. Mótasýningin byrjar klokkan 22 og tað er ókeypis atgongd.

Atgongumerkið eru at fáa frá luttakandi handlunum og í Kunningarstovuni í Havn. Á Platform siga tey, at tað er avmarkað atgongd. Gestir, ið møta áðrenn klokkan 23 kunnu nýta atgongumerkið til diskotekið eftir mótasýningina.

**-páll**

# Smyril Line umhugsar nýggja sigling

Komandi fríggjadag hevur nevndin í Smyril Line nevndarfund í Hetlandi. Millum málini, sum skulu umrøðast á fundinum í Hetlandi er møguleikin hjá Smyril Line at bjóða seg fram til at sigla millum Hetland, Skotland og Orknoyggjar.

Hetlendski nevndarlimurin í Smyril Line, Morgan Goodlad, sigur, at tað er ov tíðliga at siga um Smyril Line fer at gera álvara av at bjóða upp á siglingina. Morgan Goodlad váttar kortini, at nevndin í Smyril Line fer umrøða møguleikan á fundinum um vikuskiftið.

**-páll**